# ítróttur

Nr. 121 • fríggjadagur • 28. juni 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

## HB-unglingarnir steypavinnarar 2002



*HB spældi á útivølli í finaluni, og høvdu tí eykatroyggjur. Stuðlarnir hjá HB-unglingum eru Gummibátatænastan og EL-Keyp*
*Mynd: Finnur Justinussen*

**VB var á fyrsta sinni umboðað í einari steypafinalu fyri unglingar, og mátti lúta fyri favorittunum úr Havn.**

UNGLINGAFINALAN
*Páll Holm Johannesen*

HB-unglingarnir eru steypavinnarar fyri kappingarárið 2002. Hetta gjørdist greitt, eftir teir vunnu finaluna ímóti VB við tveimum málum móti ongum. Finalan varð leikt týsdagin seinnapart á Tórsvølli. Dysturin gjørdist ongantíð tað heilt stóra fótbóltsupplivilsið, tí bæði høvdu ilt við at fóta sær á grasinum. Nakað av regni var týsdagin, og hetta gjørdi ikki uppgávuna lættari fyri spælarnar, tí tungt var at flyta seg á vøllinum.

HB- liðið var vælmannað týsdagin, tí á liðnum høvdu ikki færri enn níggju spælarar áður roynt seg á fyrsta liðið, og tað skuldi verið góð barlast at hava til slíka finalu. Bulurin á VB- liðnum er frá dreingjaliðnum, sum í fjør vann meistaraheitið. Liðið er ungt og evnaríkt, men spælaranir hava ikki somu royndir sum HB-leikararnir.



*HB-málverjin í flúgvandi stíli*
*Mynd: Finnur Justinussen*

### Tamur fyrri hálvleikur

Í einum linligum fyrra hálvleiki, vóru hendinga møguleikar. HB hevði lítla yvirvág í spæli, har tað mesta fór fram á miðjuni. HB-framherjin, Bjarni Jørgensen, hevði ein stóran møguleika miðskeiðis í fyrra hálvleiki, tá hann gjørdist leysur við VB - málverjanum, men Bjarni skeyt framvið málinum. Bæði liðini høvdu eisini skotroyndir útifrá, men uttan at raka málið.

Stutt fyri hálvleikssteðgin eydnaðist tað HB at leggja seg á odda. Eftir eina miseydnaða sending frá HB-verjuni fram til framherjarnar, missir VB-verjuleikari bóltin inni í egnum brotsteigi og hetta verður revsað av Vagni Mohr Mortensen, ið ótarnaður kann leggja bóltin framvið VB-málverjan til hálvleiksstøðuna 1-0 til HB.

### Rani avgjørdi

Í seinna hálvleiki gjørdist spælið betri , og møguleikar vóru á bæði mál. Spælarnar høvdu eisini lættari at finna hvønn annan á vøllinum, og til tíðar var fínt fótbóltsspæl. Eitt korter inn í seinna hálvleik, vóru VB-leikarnir rættiliga óhepnir við ikki at koma ájavnt við havnaliðið. Eftir góða sending frá VB-miðvøllinum gert Eyðfinn Ludvig púra leysur við HB-málverjanum, men Pól N. Joensen hálvbjargar, og tá verjuleikari kemur honum til hjálpar, endar bólturin á tvørstongini og brestur útaftur í spæl. Ta løtuna trýstu vábingar HB-verjuna, men uttan at nakar heilt stórur møguleiki spurdist burturúr.

Miðskeiðis í seinna hálvleiki kom innskiftið Páll M. Joensen at liggja væl fyri í VB-brotsteiginum, men skotið var ikki neyvt, og bólturin fór framvið málinum.

10 minuttir fyri leiklok hevði HB vunnið sær fríspark úti í vinstra borði, og Rani D. Christiansen settur at skjóta. Frísparkið var allarhelst ætla sum innlegg, men bólturin streyk beinleiðis í málið. VB royndi at trýsta tað sum eftir var av dystinum, men uttan úrslit, og felagið úr Havn kann nú fegnast um, at fyrsta steypið í ár er komið í hús.

## -Uppiborin sigur



*Rani D. Christainsen er her avmyndaður saman við Vagni Mortensen*
*Mynd: Finnur Justinussen*

**Grasvøllurin gjørdi eisini sítt til, at fótbóltsspælið aldrin kom uppá ta hædd, tað kundi, segði annar av málskjyttunum, Rani D. Christiansen**

SAMRØÐA
*Páll Holm Johannesen*

Ein av mongu HB-unglingunum, ið hevur roynt seg á fyrsta liðið hjá felagnum, er miðvallarin Rani D. Christiansen. Eftir dystin segði miðvallarin, at sigurin var fult uppiborin, hóast HB-liðið ikki spældi upp til sítt besta. – Leikara fyri leikara eru vit betri enn VB, og sjálvt um liðið ikki spældi upp til sítt besta. Rani vísti eisini á, at tað var torført at spæla á grasinum, tí vøllurin var bæði bleytur og óslættur. –Fleiri av leikarnum, á báðum liðum, hava roynt at spælt á grasi fyrr, men nakrir fáir ungdómslandsdystir um árið er ikki nokk til, at ein venur seg við undirlagið, helt miðvallarin við eftir dystin.

## - Vit høvdu okkara møguleikar

**Tvøramaðurin á VB- liðnum segði eftir dysti, at HB-verjan avgjørt var til at snakka við**

SAMRØÐA
*Páll Holm Johannesen*

Ungi tvøramaðurin, Rasmus Nolsøe, ið spælir á 1. liði hjá TB og samstundis við unglingunum hja VB, segði eftir dystin, at ætlanin var at lokka HB-liðið fram á vøllin, og síðani dúga uppá mótálop. – Uppileggið virkaði eisini til at halda, men tá HB skorar stutt fyri hálvleik, vórðu vit noyddir at broyta uppleggið. Eisini vildi Rasmus vera við, at tá VB kom longur fram á vøllin, vísti tað seg, at HB-verjan avgjørt var at snakka við. – Høvdu vit skorað, tá vit raktu tvørstongina, hevði dysturin fingið aðra gongd, segði Rasmus Nolsøe eftir dystin.



## Fótbóltsævintýr í Brøndby á skránni

*Teir báðir Rasmus Nolsoe og Rókur á Fløtum Jespersen, her myndaðir saman eftir dystin*
*Mynd: Finnur Justinussen*



**Í unglingafinaluni vóru teir mótstøðumenn, men eftir summarfrítíðina, verða teir báðir, Rókur á Fløtum Jespersen og Rasmus Nolsøe, liðfelagir í danska stórfelagnum Brøndby**

SAMRØÐA
*Páll Holm Johannesen*

Eftir summarfrítíðina fara havnamaðurin, Rókur á Fløtum Jespersen og tvøramaðurin Rasmus Nolsøe, á eitt rættiligt fótbóltsævintýr á danska meistaraliðnum Brøndby. Báðir hava spælt fleiri ungdómslandsdystir, og skulu nú rættiliga royna seg millum danskar javnaldrar.

Í fyrsta umfari verður talan um eina sokallaða royndarsáttmála í tríggjar mánaðir, har Brøndby vil tryggja sær, at føroyingarnir trívast í Danmark. Gon gur alt eftir ætlan, skal rættiligur sáttmálið undirskrivast eftir tríggjar mánaðir. Við síðurnar av fótbóltinum, skulu føroyingarnir eisini ganga á handilsskúla.

### Venja undir Tom Køhlert

Bæði Rókur og Rasmus hava fyrr verið og royndarvant í Brøndby, og eftir summarfrítíðina skulu teir venja við unglingaliðnum og einum elituliði. Venjari á elituliðnum er ongin mættari enn Tom Køhlert, sum í vár vann danska meistaraheitið við Brøndby. Tom Køhlert var eisini høvuðsvenjari hjá Brøndby í áttatiárunum, men seinnu árini hevur hann tikið sær av elitumenningin í Brøndby, so lítið er at ivast í, at føroyingarnir koma undir køna hond.

## So taptu KÍ-kvinnurnar

**B68- kvinnurnar kunnu nú við nóg stórum sigri í síðsta dystinum, yvirhála B36 á øðrum plássi**

1. DEILD KVINNUR
*Páll Holm Johannesen*

Útsetti dysturin millum B68 og KÍ, setti endaligt punktum fyri sigursrøðini hjá KÍ-kvinnunum. Í nógva vindinum á Svangaskarði mikukvøldið taptu KÍ-kvinnurnar 2-1 móti B68. KÍ-liðið var ikki fullmannað mikukvøldið og hetta sást eisini aftur á spælinum, tí spælið gekk ikki so væl sum tað plagar. Fyrra hálvleikur var javnur, við fáum møguleikum á málini. Tá farið var til hálvleiks var støðan eisini 0-0.

### B68 byrjar væl

B68 byrjaði seinna hálvleik sum eitt óðnarveður, har tær skutu tvey mál innan teir fyrstu 10. minuttirnar. Fyrra málið var sjálvmál, har KÍ-málverjin var óheppin við einum B68-hornasparki, og bendi hornasparkið í egi mál. Seinna málið var tó ein perla. Irdi Hansen vinnur bóltin av KÍ- verjuni, og sneiðir fleiri KÍ-spælarar av, og leggur bóltin trygt framvið KÍ-málverjanum til støðuna 2-0 til B68.

KÍ royndi eftir hetta at trýsta B68, men tað ikki kom meir enn tað eina málið burturúr. Seint í seinna hálvleiki fær Rannvá Andreasen langan bólt í vinstru og trekkir inn í B68-brotsteigin og smekkar bóltin í málið til endaligu støðuna 2-1 til B68.

Leygardagin verður síðsta umfarð, áðrenn summarsteðgin spælt. Á Toftum leika B68 og HB, meðan B36 spælir ímóti KÍ í Gundadali.

## KÍ fær norskan áleypara

**Fyri at styrkja um álopspartin hevur KÍ gjørt avtalu við 29 ára gamlan norskan álopsmann, sum eisini hevur roynt seg í italskum fótbólti**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

KÍ hevur gjørt av at styrkja um álopspartin, og verður hetta gjørt við einum norskum álopsmanni. Talan er um 29 ára gamla Bjarte Vattelstad, sum kemur higar frá Sogndal.

Kurt Mørkøre, venjari hjá KÍ, hevur sum kunnugt sjálvur spælt í Sogndal í Noreg, men tó at tað júst er úr hesum felagnum, at nýggi leikarin kemur, so hava teir báðir ongan tíð spælt á liðnum í senn.

- Nei, tá eg kom til Noregs, var tað júst fyri at loysa Bjarte av. Hann fór tá at royna seg í lægru røðunum í Italia, sigur Kurt, sum tó hevur sæð nýggja KÍ-leikaran spælt.

- Hann er ein tekniskt góður leikari, og hann hevur eisini hæddina við sær, so eg rokni við, at vit kunnu fáa góða nyttu burtur úr honum, heldur venjarin.

Men merkir hetta so eisini, at Kurt Mørkøre verður meira á beinkinum framyvir?

- Tað hava vit so als ikki tikið nakra avgerð um. Sum støðan er, so mangla vit áleyparar, og tí hava vit gjørt av at royna hetta. Eisini tí tað vísur seg, sum um tað er ógvuliga torført at draga føroyskar leikarar norður til Klaksvíkar. Í so máta kann tað kanska vera ein fyrimunur, tá talan er um norskan leikara, sum helst hevur lættari at fella inn her hjá okkum, men tað fáa vit so at síggja. Ífyrstu atløgu ráddi um hjá at styrkja álopspartin, og tað vóna vit at hava gjørt við hesum, sigur Kurt Mørkøre at enda.